# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Færøernes Mellem- og Realskole:

## Realskúlamynd í 1944

Í sambandi við eina framsýning sum verður á ólavsøku í ár í gamla realskúlanum í Havn leitar Jórunn Dánialsdóttir eftir myndum av lærarum og mæmingum í "Færøernes Mellem- og Realskole" í tíðarskeiðnum 1916 til 1966. Jórunn heitir á tey, sum eiga myndir frá hesum tíðarskeiði, um at ringja til sín á tel. 316024 ella 226024. Myndirnar kunnu eisini latast inn "navnmerktar" í Wrangler Shop í N. Finsensgøtu 23 (tel. 314710).

*Myndaeigari: Jórun Helmsdal Jensen*



*Í dag hava vit mynd av 2. real í 1944. Fremsta rað f.v.: Henny Jacobsen (Egholm), Birna Zachariassen, Sunneva Sørensen (Kallsberg), Inga Jacobsen (Haraldsen), Gerda Jacobsen, Kirstin Hansen, og Karin Margretha Joensen Næs.*
*Miðraðið f.v.: Jórun Helmsdal (Jensen), Augusta Nielsen, Hjørdis Johannesen (Vestmanna), Maria Kjeld, Ása Jensen (Hátún).*
*Aftasta rað f.v.: Lina Jacobsen (Larsen), Sólrun Simonsen (Hovgaard), Elin Dahl (Johannesen), Grethe Jensen, Jona Andreasen (Petersen), og Elin Weihe (Mørkøre).*
*Myndin er tikin í einum botanikktíma í urtagarðinum hjá Richardi Long við Tinghúsvegin. Um onkur hevur okkurt at viðmerkja í samband við hesar myndirnar, eru tey vælkomin at kontakta Jórunn Dánialsdóttir.*

Fyri 35 árum síðan:

## Sjúkrasystraprógv í mars 1972



*Í mars 1972 fingu hesar sjúkrasystrarnar prógv á sjúkrasystraskúlanum á Landssjúkrahúsinum: Sunneva Anthoniussen, Oyndarfjørður, Karin Christiansen, Klaksvík, Rannvá Dam, Sandavágur, Jona Hansen, Vestmanna, Ása Hansen, Klaksvík, Finngerð Joensen, Øravík, Helena Dahl Jacobsen, Vágur, Sonja Jacobsen, Vatnsoyrar, Maureen Juul Thomsen, Tvøroyri, Sonja Veihe, Porkeri, Sólrun Thomasen, Sandavágur, Randi Vang, Fuglafjørður, Marjun Vitalis, Klaksvík, Sunneva Olsen, Tórshavn, Súsanna Carolina Petersen, Fuglafjørður, Unna Næs, Tórshavn, og Anna Helena Johansen, Tórshavn*

*Kelda: Myndaárbókin - árið ið fór 1972*

**Dagurin í morgin**

**9. mars. Fjøruti riddarar**, deyðir í 320. Keisarin Licinius gav boð um, at øll kristin skuldu avnokta trúnna. Fjøruti riddarar í Sebaste í tí núverandi Turkalandi vildu ikki gera eftir boðunum og vórðu settir naknir út á ein ísflaka, men teir valdu allir, uttan ein, heldur at frysta í hel enn at ganga frá trúnni. Sum veðrið var henda dagin, skuldi tað vera teir komandi 40 dagarnar. Sverri kongur Sigurðsson doyði hendan dagin í 1202 í Bergen.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Åge Udbø úr Havn**, andaðist á Hjørring Sjúkrahúsi 7. mars, 73 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju týsdagin 13. mars kl. 13. Sungið verður úr Sálmabókini.

Kistan við **Sofus Richard Klakkstein** úr Innistovu í Klaksvík, fer úr kapellinum á Klaksvíkar sjúkrahúsi heim í Betesda í kvøld klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Betesda fríggjadagin kl. 13.

Kistan við **Lisu Nattestad** fer úr Landssjúkrahúskapellinum leygardagin kl. 16. Jarðarferðin verður sunnudagin klokkan 14 úr Miðvágs kirkju. Tey, ið vilja minnast Lisu, kunnu lata Miðvágs kirkju eina peningagávu, konta í peningastovnunum.

**Dagmar Skarðhamar, f. Hansen**, ættað úr Sandavági andaðist í Keypmannahavn týsdagin 6. mars 97 ára gomul. Jarðarferðin verður frá Husum Vold kirke, leygardagin 10. mars kl. 09.30.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri maður mín, pápi, abbi og langabbi okkara

**Åge Udbø**

úr Havn

andaðist á Hjørring Sjúkrahúsi 7. mars, 74 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju týsdagin kl. 13.00. Sálmabókin verður nýtt.

*Familjunnar vegna*
**Ása**
**Ninna, Mads, Muddi, Poula og Kartin**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu, tá kæri pápi okkara

**Vilmund Hansen**
Tórshavn

Ættaður úr Kollafirði, andaðist og fór til gravar.

Tøkk fyri blómur og kransar og peningagávu til Mørkina og tøkk til tykkum øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Børnini**